**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0712.**
**Tíðarskeið: 21/02-07/03 - 2007**

---

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Petur Steingrund, Lis Larsen, Rógvi Mouritsen, Marit Pedersen og Kirstin Eliassen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldu vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** 75 nytrur skuldu takast av svartkjafti. Prøvar av gulllaksi vórðu tiknir til Lise Ofstad. Ongar støðir við thermistor-ketu vórðu tiknar. Hitin í trolinum varð skrásettur við miniloggarum. Vit tóku 26 grabbprøvar, men mistu grabban á position 62°18'2 N 5°13'8 W (180 m dýpi). **Um onkur fær grabban í trolið, so vinarliga blaka hann ikki útaftur, men set teg í samband við Fiskirannsóknarstovuna**.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini fríggjanáttina 23/2. Byrjaðu vestan fyri Suðuroynna (vindur av landsynningi) og tóku støðir vestanfyri, tó ikki gýtingarleiðirnar í Vágahavinum. Landaðu á Toftum mikudagin 28/2 og fóru síðan á Havnina. Fóru útaftur hósnáttina. Tóku støðir eystanfyri og norðureftir. Máttu lata nakrar støðir á Fugloyarbankanum liggja eftir, tí vit fóru á Norðhavið sunnudagin 4/3. Máttu inn á Vestmanna sunnukvøldið vegna veður og bíðaðu har til mánadagin, men avgjørdu so at bróta túrin av og at leggja veiðina upp har. Tað var sum heild lítið at fáa. Vit tóku 55 støðir.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri tosk og hýsu, men nakað lítið fyri upsa, tí vit fingu ov lítið.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 12. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 13. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Vit fingu bert umleið helvtina av toski í ár samanborið við samsvarandi túr í fjør, sí annars Talvu 1. Tað var nakað tað sama av hýsu og upsa og munandi meira av hvítingsbróðri. Annars verður víst til túrfrágreiðing fyri túr 0716, har úrslit frá túri 0712 og 0716 eru samanløgd. Lodna var at síggja í trolinum og í fiskamagum á fleiri støðum. Magakanningarnar vístu, at sera lítið var til av nebbasild, men at toskurin var væl fyri, eins og í fjør. Vit fingu ongan merktan fisk.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 0712.

| Fiskaslag | Kg per 55 hál | Nytrur | Magar | Kg per 66 hál í 2006 | Lutfall í kg/hál |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 9787.048 | 559 | 153 | 12823.285 | 0.92 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 4632.636 | | | 2177.534 | 2.55 |
| UPSI | 2544.434 | 492 | 93 | 3159.028 | 0.97 |
| TOSKUR | 2540.045 | 488 | 115 | 5796.561 | 0.53 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 1873.933 | | | 2689.796 | 0.84 |
| GULLAKSUR | 702.050 | | | 438.234 | 1.92 |
| SVARTKJAFTUR | 554.066 | 76 | | 516.671 | 1.29 |
| HVÍTINGUR | 538.896 | | | 568.493 | 1.14 |
| LONGA | 527.755 | | | 437.711 | 1.45 |
| KNURRHANI | 507.086 | | | 67.436 | 9.02 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 292.506 | | | 399.384 | 0.88 |
| REYÐSPRØKA | 288.899 | | | 520.277 | 0.67 |
| BROSMA | 259.137 | | | 245.440 | 1.27 |
| HAVMÚS | 236.300 | | | 113.092 | 2.51 |
| LÁLLA | 104.608 | | | 175.258 | 0.72 |
| TUNGA | 98.241 | | | 132.330 | 0.89 |
| LOLIGO | 88.799 | | | 17.881 | 5.96 |
| SKØTA | 86.924 | | | 7.220 | 14.45 |
| SILVURMURTUR | 63.708 | | | 166.682 | 0.46 |
| ROGNKELSI | 58.991 | | | 32.423 | 2.18 |
| HAVTASKA | 47.114 | 13 | | 109.889 | 0.51 |
| SANDSPRØKA | 46.636 | | | 43.011 | 1.30 |
| KALVI | 45.208 | | | 59.311 | 0.91 |
| SKRAMBUL | 42.181 | | | 127.056 | 0.40 |
| HVASSASPREK | 29.998 | | | 16.419 | 2.19 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 17.763 | | | 11.069 | 1.93 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 15.763 | | | 3.060 | 6.18 |
| HALIPHRON | 14.128 | | | | |
| BUKSVARTI HÁVUR | 13.938 | | | 4.647 | |
| TINDASKØTA | 11.002 | | | | |
| BLÁLONGA | 9.808 | | | 22.692 | |
| STEINBÍTUR | 8.675 | | | 13.115 | |
| LÝRUR | 8.053 | | | 6.455 | |
| TRANTKONGAFISKUR | 6.792 | | | 2.480 | |
| SVARTKALVI | 6.789 | | | | |
| GLASKVOYSA | 5.561 | | | 5.544 | |
| LÍTLA BROSMA | 5.309 | | | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 4.201 | | | 11.930 | |
| SILD | 3.977 | | | 5.718 | |
| ULVFISKUR | 3.819 | | | | |
| LIRI | 3.377 | | | | |
| HUMMARI | 2.220 | | | 2.241 | |
| MAKRELUR | 0.607 | | | | |
| ROSSAMAKRELUR | 0.436 | | | | |
| LODNA | 0.118 | | | | |
| Tilsamans | 26139.531 | 1628 | 361 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur0712d.doc.

Petur Steingrund